**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Sosialurin hevur tíðargrein í blaðnum týsdag og hósdag. Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2009?
Send eina grein til post@sosialurin.fo - Kravið er, at greinin er á leið 6000 tekn og skrivað í essay stíli



TÍÐARGREININ
*Bjarni Djurholm, løgtingsmaður*

# Gratisføroyar?!

**Tað almennu á rokanum meðan vinnan bløðir.....**

Støðan er ring. Annað árið á rað leggur landskassin rygg til undirskot, sum táttar í millardina.

Fyrri stuttum sveimaðu vit á alheims lánibylgjuni, har grammleikin var markleysur. Ævintýrið byrjaði í nítiárunum undir Clinton við Ninja lánunum, sum eskaleraðu undir Bush. Lánini í túsundum av milliardum $ vóru í høvuðheitum veitt teimum við ”no income, no job, no assets”, harav navnið Ninja.

Spekulatiónin var meginreglan og frívirði boðskapurin, har eingin framleiðsla var aftanfyri. Luft uttan innihald.

Tað mátti enda galið. Og rokningin fór um allan heim. Fíggjarheimurin endaði á knøunum.

Meðan torvurnar av projektmakarum og smartguys í velafrakkum við stressmappunum, i-phones og blunkandi laptoppunum runnu undan ábyrgdini í allar ættir, stríddust stjórnurnar at bjarga tí, ið bjargast kundi.

**Gandaorðið**

Køldu fíggjarligu vindarnir tóku eisini land her. Út á árið 2007 stagneraðu inntøkurnar. Kortini var hildið á, sum um einki var á vási. Almenni útreiðsluvøksturin rundaði 300 mio. kr árliga.

Og búskaparfrøðingarnir eggjaðu politikarum at tøma allar goymslur. Búskapurin skal ikki tillaga seg. Harafturímóti skulu útreiðslur landskassans samsvara við inntøkurnar undan fíggjarbræðingini. Rokningin verður skrivað uppá framtíðina.

Soleiðis ger almenna lánifíggjaða peningaumfarið, at kostnaðarstøðið verður hildið kunstiga uppi til einki samsvar er millum framleiðslu og peninganýtslu.

So, meðan almennu Føroyar eru á rokanum við almennari lántøku, bløðir vinnan spakuliga burtur.

Búskapurin sleppur ikki at laga seg til veruleikan. Alt fíggjarligt skilvísi verður skúgvað til víks. Sunnur borgarligur íhaldspolitikkur verður hildin lítisverdugur. Alt ber til.

Gandaorðið er raðfesting - nýggja hugtakið, sum politiskt tók land fyri fáum árum síðani. Hugtak uttan innihald, produserað til burturforkláringar - at tøla við.

**Skálkurin**

Í kjalarvørrinum av peningaríkiligheitini farnu árini verður dusað sær í gratissamfelagnum. Øll hava krav uppá almennar veitingar. Umfordeilingin gjørd til politiskt projekt. Einki himpr, tá talan er um at nýta pening hjá øðrum. Eftirlætið er meginreglan heldur enn undantakið.

Skálkurin í hesum eftirlætissamfelagnum er tølandi altfevnandi samhaldsfestið, sum fremur eina skipan, ið revsar arbeiði, samsýnir tey krevjandi, heldur tey arbeiðssama fyri gjøldur og ger njótaran líka heiðurligan sum tann nærlagda.

Soleiðis førka vit okkum móti búskaparligu eggini. 600 mio. kr eru laðaðar omaná bleytu rakstrarøkini farnu 5 árini. Ikki króna spard á økinum, nú tað sansar at - bert minni útreiðsluvøkstur. Kortini er ónøgdin lemjandi móti politiska myndugleikanum. Hvussu verður skilið, tá landið verður noytt at fremja veruligar sparingar, sum fara at niðurlaga øki, sum er neyðug og hildin sjálvsøgd?

**Sjálvsving**

Meðan hóttafall soleiðis merkir búskapin, so eru stórmálini nú togan um flyting av almennum stovnum?!

At vinnan er komin í klemmu av hækkandi avgjøldum og at útlendsk arbeiðsmegi fær durafjórðingin tykist ikki at nerva stórvegis. Hinvegin sýnist tað, sum um øll politiska skipanin er í sjálvsvingi, har spurningurin í stóran mun er, hvat vit skulu brúka, heldur enn hvussu vit realisera neyðugar rationaliseringar.

Kann løgtingið bert semjast um at tálma útreiðsluvøksturin og í sama viðfangi skriva rokningar til vinnuna at gjalda, standa vit fyri hóttafalli, sum verður trupult at koma burturúr.

Eitt er vist, at samtykkja fíggjarlóg, har yvirbjóðingin er boðskapurin og signalpolitikkurin meginreglan, tað fer ikki at føra okkum burtur í tí tronga, sum samfelagið er á veg inn í.

**Stokkutur hiti**

Kanska summi síggja avbjóðingarnar loystar, verður olja funnin undir landgrunninum í næstum. Henda vón kann tó gerast stokkut, og frítekur undir øllum umstøðum ikki løgtingið frá at taka neyðugu avgerðirnar, so samfelagið ikki fer at renna seg í skuldarfelluna við niðurbræddum kappingarføri.

At renna undan neyðugu sparingunum við at skriva skatta- og avgjaldsrokningar út á vinnu og borgarar verður stokkutur hiti. Lítið øðrvísi enn at gera seg vátan í brókunum.

Vit eru á eini avgerandi krossbreyt. Taka vit ikki røttu avgerðirnar, so fara fólk at rýma av landinum, og onnur fara at seta treytirnar fyri okkara tilveru framyvir.

Tað skuldi ikki verið meiningin.




*Meðan hóttafall merkir búskapin, eru stórmálini nú togan um flyting av almennum stovnum. Hetta er Taks seinasta dømi um*

Tíðargreinin

# Gevist nú at rógva aftur á aftur

FRANK DAVIDSEN
Sørvágur



**»Minst møguligar útbyggingar í Vágum«.**

Hesi vóru orðini frá einum løgtingsumboði, aftan á at Jóhan Dahl saman við leiðsluni av Vága Floghavn kunnaði Løgtingið um ætlanirnar at útbyggja flogvøllin.

Annað løgtingsumboð metti, at tað var altavgerandi at bíða eitt hálvt ár til kanningarnar av Glyvursnesi vóru lidnar. Nú eru tað umleið 20 ár síðani, kanningar vóru viðvíkjandi Glyvursnesi. Onkur vildi verða við, at Tórshavnar Kommuna legði 5-6 milliónir krónur í hesa verkætlan. Vindmátarir vórðu settir upp, og flogfar úr Íslandi gjørdi testflúgvingar á Glyvursnesi.

Hesi 20 árini síðani hevur serkunnleikin ikki funnið út av vind- og veðurviðurskiftinum á Glyvursnesi, men nú vilja summi løgtingsumboð kortini steðga útbyggingini í Vágum fyri at bíða eftir nøkrum vindmátingum á Glyvursnesi. Tað sigur mær so mikið, at tað eru heilt onnur endamál, ið gera seg galdandi, nevnliga at steðga útbyggingini av verandi flogvølli fyri ein og hvønn prís, við ella uttan argumentir.

Áðrenn vit fingu fast samband, var farleiðin alt ov long til Vágarnar, og tað var frammi, at alt viðførið skuldi innskrivast í Tórshavn.

Fram til 2005 løgdu landsstýrismenn Fólkafloksins fótonglar fyri útbyggingini av flogvøllinum við at krevja, at danir skuldu gjalda útbyggingina. Tað var sum at seta eld í fjús, ikki talan um søgdu danir, og væl nøgdir vóru Finnbogi og Bjarni, tí so var neyðuga útbyggingin av flogvøllinum løgd á ís.

Men í 2005 tók táverandi løgmaður Jóannes Eidesgaard málið í egnar hendur. Uttan stórvegis hóvasták gjørdi hann semju við danir, og neyðugur peningur varð fingin til vega til at útbyggja verandi flogvøll.

Nú er so klárt at bjóða arbeiðið út, sum harafturat verður bílligari orsaka av minkandi virkseminum í landinum. Men knappliga er fanin leysur.

»Minst møguligar útbyggingar«, sigur ein. Tað vil við øðrum orðum siga: skrottið verandi flogvøll, hvørki meira ella minni.

Tað er rættuliga sjáldan fyri ikki at siga ongantíð, at ein verkætlan hevur havt fíggingina klára, soleiðis at tað er bara at fara í gongd, men nú eru tær 400 milliónirnar, henda útbygging fer at kosta, knappliga ein so øgilig upphædd, at vit mega steðga á.

Tað stutta av tí langa er, at tey løgtingsumboð, sum ikki taka undir við hesi verkætlan, hava eittans endamál, og tað er at útseta verkætlanina og niðurpína flogvøllin og teir facilitetir, ið har eru.

Tað eru ongar íløgur gjørdar í 30 ár, so eyðnast tað at steðga hesi heilt avgerðandi útbygging, sum er bráneyðug - millum annað er eitt flogfar bílagt fyri 250 milliónir krónur, treytað av eini leinging av flogvøllinum - so kann tað væl henda, at tað eisini fer at steðga tí menning, sum okkara flogfelag hevur sett sær fyri tey næstu árini.

Tað skal tí vera mín vón, at Løgtingið tekur atlit til, at allar fyritreytir eru til staðar, at tað er ein skilagóð avgerð at leingja verandi flogvøll og at nýtímansgera terminalin, soleiðis at bæði vinnulív, ferðavinna og vanligi føroyingurin næstu árini fáa eina optimala tænastu viðvíkjandi flutningi loftvegis.